# Miðnámsrit

14 september 2017

## Um blaðið

Ársverkið á miðnámi køvir hugin hjá lærarum í teirra veruliga arbeiði. Tapararnir eru næmingarnir. Kanning hjá Yrkisfelagnum Miðnámi vísir, at meginparturin av kvinnuligu miðnámsskúlalærarunum við børnum í barnagarðs- ella skúlaaldri arbeiða undirtíð.

Nám vil hava fleiri føroyskar grundbøkur á miðnámi. Fyrr í ár var handritakapping, sum skuldi birta upp undir føroyska lærubókaskriving.

Jagstranin eftir próvtølum oyðileggur læring og fakliga dýpd. Tað hava lærarar vitað leingi. Miriam Brems, sum bara fekk 12-tøl á miðnámi, iðrar seg nú um, at hon ikki tók av møguleikanum at læra meira og fáa betri innlit og meiri vitan fyri eitt neyðars 12-tal.

Skulu vit framhaldandi duga fremmandamál í Føroyum? Maria Heradóttir rópar varskó, tí øll fremmandamál uttan eingilskt eru fyri stórari afturgongd í føroysku skúlunum.

Blaðstjórn: Olav Absalonsen og Tórður Johannesarson

# Innihaldsyvirlit

**Ársverkið køvir hugin, Tórður Johannesarson** **3**

**Handrit til vinnulívsrætt vann kapping hjá Námi, Dorit Hansen** **7**

**Betri sýni og størri dýpd, Dorit Hansen og Sólvá Jónsdóttir, Nám** **9**

**Marknaðarlæra – lærubók á miðnámi, Olav Absalonsen** **12**

**Marknaðarbúskapur, Olav Absalonsen** **17**

**Próvtalsjagstran oyðileggur fakligheitina, Miriam Brems** **22**

**Skulu vit framhaldandi duga fremmandamál í Føroyum? Maria Heradóttir** **24**

# Ársverkið køvir hugin

Tórður Johannesarson

**Í Mentamálaráðnum hava fólk ofta lyndi til at kopiera loysnir innan miðnám, sum danskir skúlamyndugleikar gera, og hetta bleiv tíverri eisini gjørt, tá ið vit fingu arbeiðstíðaravtalu við ársverki og nýggja gymnasiala skipan í 2013.**

## Fólkaskúlin og ársverk

Í 1993 varð ársverkið ella ársnomurin settur í verk í danska fólkaskúlanum. Áðrenn ársverkið kom, bleiv arbeiðið hjá lærarum skipað í vikuverk ella vikunorm.

Lærarar í føroyska fólkaskúlanum vóru fram til 1998 bert settir í starv sum tænastumenn - har var ongin sáttmáli at seta lærarar eftir. Frá 1987 og tey næstu 10 árini varð ongin lærari í fólkaskúlanum settur í fast starv. Hetta var ein ótolandi støða hjá nógvum lærarum, ið vóru noyddir at søkja starv á hvørjum ári. Við sáttmálasamráðingarnar í 1997 ásetti Fíggjarmálaráðið, at lærarar skuldu fáa ein sáttmála, men ein av treytunum var, at arbeiðstíðin varð skipað sum ársverk.

Í semjuni millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í 1999 varð niðurfelt, at samráðingar um arbeiðstíðina skuldu byrja í seinasta lagi í januar 2000. Har var eisini ein avtala um eina áseting av arbeiðstíðini. Arbeiðstíðin var 2080 tímar íroknað frítíð, halgidagar og fastar frídagar. Tá hesir dagar vóru drignir frá, var arbeiðstíðin 1800 tímar. Hetta varð galdandi frá 2003. Áðrenn hevði Føroya Lærarafelag eina uratkvøðu millum limirnar, og tað var stórur meiriluti fyri at fella uppskotið. Tveir triðingar atkvøddu ímóti, hetta kom møguliga av, at næstan allir lærarar vóru tænastumenn - og teir ynsktu onga broyting í verandi arbeiðsviðurskiftum. Ein onnur orsøk kundi verið, at lærarar vóru ímóti ársverkinum?

## Ársverk á miðnámi

Í 2013 bleiv arbeiðstíðaravtala við ársverki gjørd fyri gymnasialt miðnám og fyri yrkisútbúgvingar innan handil. Frammanundan hevði ársverk verið innan tekniskt miðnám, har tað var væl egnað, tí nógv av undirvísingini har var í skúlaskeiðum og ikki í skúlaárum; men tað var meira einfalt enn tað, sum hinir miðnámsskúlarnir fingu í 2013.

Hesi fýra árini við ársverki innan gymnasiala økið og FHS hava miðnámsskúlalærarar gjørt sær nakrar royndir. Tankin um ársverk byggir nokk á, at lærarar skulu hugsa um skúlaárið sum eina heild, har teir skulu arbeiða í toymum og hugsa meira tvørfakligt. Lærarar, sum knossaðust og stríddust, fingu í vikunorminum somu løn sum teir, ið lógu á linkanum. Sum dømi kann nevnast, at í próvtøkutíðini var sera órættvíst fyrr, tá ið summir

lærarar fingu frí hálvan mai at kalla, meðan aðrir vóru næstan koyrdir í senk hesa tíðina – men allir fingu somu løn.

Hugsanin var nokk, at ársverkið skuldi verja teir, ið arbeiddu ov nógv? Onkursvegna varð eitt loft sett á, so hesir ikki skuldu overva seg, og tískil fáa strongd. Í ársverkinum liggur ein akkordskipan, sum helst er ein motivatión, at arbeiðir ein lærari nógv, so kann hann eisini fáa fleiri akkordir. Tað vil siga, at teir "latu" fáa lítið og teir "ágrýtnu" fáa meir. Nú skuldu vit hildið, at skipanin var motiverandi. Men er tað so einfalt? Leiðslurnar bæði í fólkaskúlanum og miðnámi hava sannað, at ársverkið er ein ósmidlig skipan, og hava tær tí lagt fleiri akkordir inn fyri lærarar frá ársbyrjan, til dømis toymisarbeiði, fundarvirksemi, royndir, eftirmetingar og tiltøk av ymiskum slagi. Enn eru fleiri ting, sum ikki verða løgd inn frá ársbyrjan, sum áður vóru natúrligur partur av lærarayrkinum. Við ársverkinum verður hetta gjørt ónatúrligt, tí at nú mugu lærarar skráseta slíkt virksemi. Teir skulu fleiri ferðir um árið senda leiðslum akkordir inn, og gera teir ikki tað, kunnu teir fáa stórt undirskot í sokallaða tímabankanum. So lærarar eru í dag blivnir til bókhaldarar, ið skulu skráseta líkt og ólíkt í einum rokniarki. Fleiri kenna tað sum, at hetta gongur út yvir undirvísingina og gleðina at undirvísa, tí fokus verður sett á skráseting ístaðin fyri undirvísing. Hetta er stórt spell, tí at flestu lærarar hava ikki hug at fáast við bókhald, teir vilja sleppa at fáast við læring. Helst liggur sum nevnt í tankanum um ársverkið ein motivatión, men onkursvegna er tað blivið soleiðis, at ársverkið køvir hugin at gera meir enn hægst neyðugt. Og umsitingin í skúlanum hevur fingið nógv eyka arbeiði av at halda skil á ársverkinum og tímabankanum hjá tí einstaka læraranum. Her eru nógv eyka ársverk komin afturat, sum kundu verið brúkt til undirvísing og læring.

Skipanin hevur sløkt eldsálir, ið fyrr framdu alt tað, sum lá sum natúrligur partur av lærarayrkinum, tær gjørdu sítt arbeiði við gleði og eldhuga, tí at tað gav meining. Nú yppa hesar eldsálir øksl við umberingini "eg havi nokk av akkordum!" Tað er lættari hjá lærarum at siga nei til serligar uppgávur, sum verða løntar við akkordum, tí teir kunnu so at siga "gjalda" seg frá tí. Tað ger tað eisini truplari hjá leiðsluni at fáa skúlan at virka. Hvørja ferð okkurt skal gerast og onkur skal biðjast, verður svarið: Hvussu nógvar tímar fái eg fyri tað? Hugsanin við ársverkinum er nokk, at lærarar fáa løn fyri tað, sum teir gera. Men henda hugsanin er eitt tvíeggjað svørð, tí nú ger eingin nakað uttan at fáa løn fyri tað. Lærarar verða til dømis bidnir um at gera viðmerkingar til heimasíður, kunngerðir og nýggjar sáttmálar, men eingin ger hetta, tí at akkordir ikki fylgja við. Sáttmálin, sum vit hava í dag, fer heilt niður í at rokna hálvar tímar av einum ársverki upp á 1.750 tímar. Ársverkið er eitt kopi úr Danmark, har tað ikki virkar væl, og mentanarligir munir gera, at tað als ikki riggar í Føroyum. Alt hetta gongur út yvir trivnaðin hjá lærarunum – og harvið undirvísingina og læringina. Ársverkið verður sostatt dýrt í longdini, tí minni lærdómur spyrst burtur úr skattapengunum, sum skuldu og verið – og kundu verið – brúktir við betri

skili. Skúlaskipanin tapti aðrastaðni, sum hetta varð sett í verk, og vit vistu, at soleiðis fór at vera í Føroyum.

## Nýggja miðnámsskúlaskipanin

Sama ár, sum avtalan um ársverk kom, fingu vit nýggja gymnasiala miðnámsskúlaskipan. Stórur munur er á hugsanini ella tonkunum í nýggju og gomlu skipanini. Í gomlu skipanini var arbeiðið stýrt eftir pensum. Lærarar og næmingar vistu effinett, hvat ið teir skuldu gera. Í nýggju námsætlunum verður dentur lagdur á førleikar, sum næmingar skulu ogna sær. Í nógvum førum eru nýggju námsætlanirnar orðaðar óneyvt, og lærarar eru noyddir at gita sær til, hvat myndugleikin ynskir av teimum.

Samstundis, sum vit fingu nýggja skipan, fingu vit eisini nýggjan sáttmála og áðurnevnda ársverk, sum hevur verið eitt bakkast fyri miðnám. Sum heild hava miðnámsskúlalærarar ikki tikið væl móti nýggju skipanini. Ein kanning, sum Yrkisfelagið Miðnám gjørdi í mars 2017, vísir, at 78% av miðnámsskúlalærarum dámar betur gomlu skipanina.

## Lærarar skulu undirvísa meir

Nýggi sáttmálin bar millum annað í sær, at lærarar á miðnámi skuldu undirvísa nógv meir, enn teir høvdu gjørt fyri at koma upp á ársnormin, ið bleiv settur til 1750 tímar. Vit kunnu á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum 6. juni 2013 lesa, "at partur av semjuni er, at næmingar, ið fara undir útbúgving 1. august í ár, skulu lata inn færri skrivligar uppgávur. Tá fara lærarar at brúka minni tíð til at rætta uppgávur og meira tíð saman við næmingunum. At lærararnir fara at undirvísa meira er ein sparing fyri landið, sigur Jørgen Niclasen, fíggjarmálaráðharri". Á Vágaportalinum fyrst í juni 2013 kunnaði hann um, at landið kom at spara 9 milliónir um árið við hesum sáttmálanum.

Ein orsøk til, at lærarar skuldu undirvísa meir, var, at tað vóru nógvir rættibrøkar, ið fóru sera nógv niður. Rættibøkur er tann samsýning, sum lærarar fáa fyri at rætta uppgávur. Í summum lærugreinum fór brøkurin niður við um 60%. Í fleiri lærugreinum skuldu næmingar ikki lata uppgávur inn, og tí skuldu lærararnir undirvísa meir fyri at koma upp á 1750 tímar. Sum dømi kann nevnast, at í lærugreinini søgu, skulu næmingar ikki lata uppgávur ella ritgerðir inn, tí lærarin fær ikki samsýning fyri at rætta. Avleiðingin er, at dygdin ella førleikar at skilja søgu er minkaður munandi. Soleiðis er eisini í øðrum lærugreinum. Sum heild skriva næmingar nógv minni nú enn fyri 2013, og orðatilfeingið er eisini blivið verri. Fyrr kundu lærarar eisini kanna førleikarnar hjá næmingunum við innanhýsis royndum, men hetta verður ikki gjørt longur, tí at eingin rættisamsýning er fyri hetta arbeiðið. Samstundis stendur í námsætlanum, at dentur skal leggjast á eftirmeting, men so lítil tíð er sett av til rætting og meting, at fleiri lærarar kenna seg noyddar bara at geva próvtøl ístaðin fyri dygdargóðar eftirmetingar, sum næmingar kunnu læra nakað av.

Ein avleiðing av nýggja sáttmálanum var, sum sagt, at lærarar skuldu undirvísa meir fyri at koma upp á 1750 tímar í ársverkinum. Um vit hyggja burtur frá rættisamsýningini, skal hvør einstakur lærari í miðal hava ein flokk meir við trimum lektiónum um vikuna fyri at koma upp á ársnormin. Hetta kann tykjast ikki at vera so nógv, men avleiðingin er, at dygdin í undirvísingini er fallin munandi síðan 2013. Fyrr høvdu lærarar góða tíð at fyrireika seg, men soleiðis er ikki longur. Nú skal alt ganga skjótari, og fakliga dygdin kann ikki verða sett í hásæti, tí at lærarin rennur úr einari stovu í aðra.

## Hvørjar avleiðingar eru av nýggju skipanini og sáttmálanum?

Misnøgdin millum miðnámsskúlalærarar er sera stór. Kanningin hjá Yrkisfelagnum vísti, at 25% av teimum spurdu arbeiddu undirtíð, serliga eru tað konufólkini. Kanningin vísti eisini, at 71% av teimum spurdu kundu hugsað sær at farið niður í tíð. Hjá teimum, sum antin vóru noydd at arbeiða minni enn fulla tíð, vísir kanningin, at hjá 72% er hetta hent seinastu tvey árini. Kanningin vísir eisini, at heili 31% eru farin niður í tíð seinastu trý árini. Høvuðsorsøkirnar eru, sambært kanningini, at arbeiðsbyrðan er økt munandi, og at broytingar eru í skúlaskipanini. Hetta hevur eisini havt avleiðingar, tí at 62% av teimum spurdu miðnámsskúlalærarunum siga seg innan fyri tey seinastu árini kent seg havt illgruna um strongd. Heili 76% siga, at tey kenna, at teirra arbeiðslív gongur út yvir privatlívið.

Um vit hyggja at tølunum fyri teir lærarar, sum arbeiða undirtíð, so er meginparturin kvinnur, talan er serliga um kvinnur, ið hava børn í barnagarðsaldri og fólkaskúlaaldri. Samstundis sum tær hava valt ella eru noyddar at fara niður í tíð, verður ein av avleiðingunum framyvir, at tær fáa eina lægri pensjón enn menninir, tá ið tær fara frá. Sum heild kann sigast, at tapararnir eru næmingarnir, samfelagið og alt Føroya fólk.

Um vit skulu fáa miðnámsskútuna aftur á kós, mugu vit endurskoða ársverkið, sum er, og varðveita tað sindrið í tí, sum er gott, og vraka alt tað, sum bara køvir undirvísing og læring, og sum økir um umsiting og skrivstovuveldi. Vit mugu hugsa stórt og skilja, at ein sparing í kostnaði kann hava við sær, at tað verður dýrt í longdini, um sparingin ikki vigar upp í móti tí skaða, hon ger.

## Keldur

Kanning hjá Yrkifelagnum Miðnám, 2017.

Nýggjur sáttmáli: Meira og betri skúli, 6. juni 2013.

# Handrit til vinnulívsrætt vann kapping hjá Námi

Dorit Hansen

**Visjónin hjá Námi er, at allar lærugreinir í fólkaskúlanum og allar kravdar lærugreinir á B og C stigi á miðnámi skulu hava eina grundbók, sum er á føroyskum máli og ikki er eldri enn 10 ár, og at lærugreinir á A, B og C stigi, sum nógvir næmingar velja, eisini eiga at hava undirvísingartilfar á føroyskum máli.**

Louise Restorff Jacobsen úr Havn vann í summar (2017) handritakappingina, sum Nám hevði skipað fyri. Tvær virðislønir upp á 50.000 krónur vórðu latnar, onnur fyri besta skúlabókahandrit til miðnám og hin fyri besta skúlabókahandrit til fólkaskúlan. Níggju handrit komu inn til kappingina, fimm til fólkaskúlan, trý til miðnám og eitt, sum var ætlað lærarum í bæði fólkaskúla og miðnámi. Dómsnevndin metti, at uppskotið hjá Louise Restorff Jacobsen til lærugreinina, vinnulívsrætt, var besta handritið til miðnám. Høvuðs-útgávumiðilin til miðnám er sBóka-skipanin, og tilfarið hjá Louise Restorff Jacobsen varð mett væl egnað til hesa skipan.

- Vit løgdu hundrað túsund krónur á borðið, tí vit vildu troyta nýggjar leiðir og koma í samband við nýggjar møguligar lærubókahøvundar, segði Regin Marnersson, táverandi stjóri í Námi, í sambandi við, at kappingin varð kunngjørd. Samstundis legði hann dent á, at Nám var áhugað í at fáa fleiri upprunaføroyskar útgávur.

## Vinnulívsrættur við støði í tí føroyska

Vinnulívsrættur er lærugrein á C-stigi í miðnámi og kravd lærugrein á Búskaparbreytini. Eingin føroysk lærubók er til lærugreinina frammanundan.

Í síni grundgeving fyri, at handritið hjá Louise vann, segði dómsnevndin m.a.: Handritið er væl skrivað, málsligi og námsfrøðiligi búnin hóska væl til miðnám, og høvundurin hevur hugsað um at hava bæði filmsbrot og venjingaruppgávur aftur at lærutilfarinum.

Tørvur er á at fáa løgfrøðiliga vitan á føroyskum máli, heldur vinnarin.

- Donsku lærubøkurnar eru grundaðar á danskar ásetingar og læra ikki næmingarnar um tey serligu føroysku viðurskiftini, sigur Louise Restorff Jacobsen, sum hevur lisið løgfrøði bæði í Danmark og Føroyum.

- Tað er rættiliga stórur munur á føroyska og danska samfelagnum, og eg minnist, hvussu óviðkomandi eg helt bøkurnar vera, tá eg sjálv hevði vinnurætt á hægri handilsskúla.

Handritið hjá Louise tekur atlit at galdandi føroyskum rætti, og rithøvundurin hevur lagt dent á, at dømini eru føroysk, nýggj og so viðkomandi fyri ung, sum til ber.

Handritið leggur upp til, at tað verður ein grundbók og ein arbeiðsbók, og harumframt eru smáar ávegis royndir, ið skulu vísa, um næmingarnir hava skilt tilfarið, ella um tørvur er á at varpa ljós á serlig brot. Ætlanin er, at bókin skal verða skipað í kapitlar, sum umframt grundtekst og myndir eisini hava kassar við lógarteksti og kassar við dømum og rættar-siðvenjum.

## Kapping gav dirvi at bjóða seg fram

Louise Restorff Jacobsen er 27 ár og útbúgvin løgfrøðingur frá Aalborg universiteti í 2015. Harumframt hevur hon eisini júst lokið prógv sum master í løgfrøði á Fróðskaparsetri Føroya. Hon hevði leingi hugsað um at skriva føroyskt undirvísingartilfar í vinnurætti, men hevði ikki havt mót at bjóða seg fram, tí hon ikki hevði royndir sum lærari.

Louise hevur arbeitt sum løgfrøðingur í Fjarskiftiseftirlitinum, í Hugskotinum hjá Tórs-havnar Kommunu og í Rættarhjálpini. Beint eftir at handritakappingin varð kunngjørd í fjør (2016), fekk Louise starv í grønlendska heilsumálaráðnum, og hon flutti til Nuuk við manni og syni sínum. Men dreymurin um at skriva undirvísingartilfar helt fram at spøkja, og eftir jól 2016, tá tey vóru komin til sættis í grønlendska høvuðsstaðnum, byrjaði hon spakuliga at arbeiða við handritinum.

- Eg hugdi einaferð á heimasíðuna hjá Námi, og har stóð, at Nám helst brúkti royndar lærarar sum rithøvundar, so hóast eg leingi hevði hugsað um tørvin á føroyskum tilfari, hevði eg ongantíð boðið mær til, tí eg ongar undirvísingarroyndir hevði. Men tá kappingin varð útskrivað, hugsaði eg, at nú var tað handritið sjálvt, sum kundi vísa sínar dygdir. Eg brenni fyri føroyskari løgfrøði, so hetta var ein møguleiki, sum eg mátti royna, sigur Louise Restorff Jacobsen.

Hon vónar eisini, at nýggja bókin verður ein góð sjálvhjálparbók hjá føroyskum íverk-setarum.

- Tá tú hevur fingið miðnámsprógv á Búskaparbreyt, so eigur tú at hava ta vitan, sum er neyðug fyri at kunna stovna egið virki í Føroyum. Handritið lýsir tí teir týdningarmestu føroysku stovnarnar og viðger øll tey týdningarmestu rættarøkini, og kanska verður bókin eisini hent hjá teimum, sum longu hava stovnað egið virki.

Louise Restorff Jacobsen hevur gjørt rithøvundasáttmála við Nám, og eftir ætlan skal nýggja sBókin verða til keyps næsta skúlaár (2018-19), men longu seinni hetta skúlaárið (2017-18) verða partar av tilfarinum tøkir hjá lærarum og næmingum at royna.

# Betri sýni og størri dýpd

Dorit Hansen og Sólvá Jónsdóttir, Nám

***Sýni & Dýpi* er undirvísingarrøð til øll trý árini í lærugreinini føroyskum í miðnámi. Heildirnar til tvey tey fyrstu árini eru tøkar, og triðja heildin er í gerð.**

Sum móðurmálslærugrein hevur føroyskt altíð verið ein mentanarberandi lærugrein í føroyska miðnámsskúlanum, og tá danskt varð vallærugrein í 2013, gjørdist ábyrgdin hjá føroyskum kanska uppaftur týðiligari.

Móðurmálslærugreinin skal, umframt føroyskt mál og føroyskar bókmentir, eisini kunna næmingarnar um evropeiska bókmentasøgu og um samskifti, málnýtslu, tekstgreining og samansettar tekstir. Henda ábyrgd hevur verið okkum ritstjórum frammarlaga í huga, tá vit hava fyrireikað og ritstjórnað bøkurnar *Sýni & Dýpi*.

Fyri at tryggja sær, at undirvísingin hevur fevnt um øll økini í námsætlanini, hava flestu føroysklærarar gjørt egið tilfar til teir partar av lærugreinini, har tilfar ikki hevur verið tøkt í grundbókum til lærugreinina. Men við *Sýni & Dýpi* er Nám fyri fyrstu ferð í holt við at geva út eina heild, sum fevnir um allar tættir, sum hoyra til lærugreinina føroyskt í miðnámi.

Samskifti, mál í nýtslu, samansettir tekstir, málpolitikkur, málsligt fjølbroytni og týðing eru dømi um øki, sum ikki áður hava verið í grundbókum til føroyskt í miðnámi. Føroyska bókmentasøgan og føroysku tekstirnir verða eisini í stóran mun settir í ein norðurlendskan og evropeiskan samtekst. Millum týddu rithøvundarnar kunnu vit nevna Homeros, Boccaccio, Shakespeare, Kingo, Holberg, Goethe, Oehlenschläger, Heinrich Heine og Emily Brontë.

## sBøkur og pBøkur

*Sýni & Dýpi 1* og *Sýni og Dýpi 2* eru báðar tøkar sum sBøkur. sBók er heitið á netbornum bókapalli, sum Nám nýtir til sínar miðnámsútgávur. sBókin byggir á logikkin, sum vit eru von við í pappírsbókini, síðurnar eru t.d. settar saman í beinum rað. Men umframt vanligar tekstir og stillar myndir hava sBøkurnar eisini hentleikar, sum liggja í talgilda pallinum og internetinum, t.d. film, ljóð, samvirknar uppgávur og skjótar leitimøguleikar.

Nýggja tøknin setur nýggj krøv, eisini í skúlastovuni, har internetið bæði er ein avbjóðing og ein hentleiki. Við sBókunum vil Nám geva lærarum og næmingum undirvísingartilfar, sum er viðkomandi og gagnnýtir teir møguleikar, sum liggja í talgildu og netbornu tøknini.

Næmingarnir hava sína egnu, persónligu sBók, har teir t.d. kunnu skriva viðmerkingar í, og teir hava atgongd til sína egnu bók á øllum pallum, sum eru knýttir at internetinum.

Harumframt ber eisini til at taka eina pdf-útgávu niður á telduna, sum næmingarnir kunnu brúka, tá teir ikki hava atgongd til internetið. Og í vár komu tvær tær fyrstu bøkurnar í sonevndari pBókaútgávu. Ein pBók er stytt útgáva av einari sBók. Alt tað talgilda og samvirkna tilfarið kann sjálvandi ikki flytast á pappír ella í eina bók við avmarkaðum síðutali, men allir høvuðstekstir eru við í pappírsútgávunum av *Sýni & Dýpi 1* og *2*. Pappírsútgávurnar eru tøkar sum fáprent, t.v.s., at tær eru ikki á goymslu, men verða prentaðar eftir bílegging frá lærarum og næmingum.

Tá Nám gevur skúlabøkur út, er tilfarið viðgjørt, soleiðis at tað riggar til málbólkin, svarar til námsætlanina og leggur upp til so góða læring sum møguligt. Tá talan er um pappírsbøkur, setur formatið greiðar avmarkingar fyri innihaldið, men støðan er ein onnur við talgildu og netbornu sBókini, sum í grundini kann verða givin út við óendaliga nógvum tilfari, sum kann dagførast so hvørt, sum tørvur er á tí. Øll tann nýggja týðingin av *Føroyingasøgu* passar t.d. í *Sýni & Dýpi 2*, og *Sýni & Dýpi 1* hevur 1123 uppgávur, 65 samvirknar uppgávur, 8 verkstovur, 54 filmsbrot, 70 ljóðupptøkur, 140 myndir, 407 orðafrágreiðingar, 8 greiningarfrymlar, 102 skaldsligar tekstir, 14 yrkistekstir og 74 tekstbrot.

## Í samsvari við námsætlan

Ætlanin við røðini *Sýni & Dýpi* er, at hon skal spegla fjølbroytnið í námsætlanini fyri lærugreinina, og viðkomandi fakligu førleikamálini standa á fyrstu síðu í hvørjum parti í Sýni.

Hvør bók er býtt í tveir partar, ein ástøðiligan part og eitt tekstasavn. Sýni er ástøði um samskifti, mál og tekstgreining umframt mál- og bókmentasøga. Dýpi er savn av tekstum, sum kunnu verða lisnir og greinaðir einsæris, í samteksti og/ella í sambandi við tað ástøði og ta søgu, sum eru í Sýni.

Í fyrstu bókini verður dentur serliga lagdur á tekstsløgini. Ástøði verða lýst í Sýni, greiningarfrymlar eru til øll høvuðstekstsløgini, og savnið í Dýpi er skipað eftir tekstsløgum. Í Sýni 2 og 3 verður bókmentasøgan lýst, og tekstirnir í Dýpi 2 og 3 verða skipaðir eftir bókmentaligum tíðarskeiðum. Kunning um rithøvundar, arbeiðsuppgávur og orðafrágreiðingar eru í øllum trimum bókum.

Men sum sagt, so fevnir *Sýni & Dýpi* um annað enn bókmentir og tekstir. Í Sýni 1 er ein partur um, hvussu vit samskifta, hvussu ymiskt málið verður brúkt til gerandis og til ymisk høvi, og um hvussu fjølbroytt og staðbundið málið er. Harumframt er ein partur, sum lýsir føroyska málsøgu og mállæru, og ein partur um okkara grannamál í Norðurlondum. Í Sýni 2 verður m.a. hugt at málpolitikki og týðing.

Harumframt hava allar tríggjar bøkurnar ein drúgvan inngang, sum viðger grundleggjandi støðisførleikan at samskifta: at bera fram hugsanir sínar munnliga (at tala og lýða á) og at lesa og skriva. Allar tríggjar hava ein inngang um samskifti, men stigvøkstur er millum bøkurnar. "Grund" í 2'aranum viðger m.a., hvussu vit brúka málið, hvussu vit lesa strategiskt, og hvussu vit byrja, tá ið vit skulu skriva ein tekst. Allar tríggjar bøkurnar hava eisini ein part um samansettar tekstir, sum viðger tekstsløg sum film, teknisøgur og myndir.

## Ikki komin á mál enn

Fleiri miðnámslærarar í føroyskum hava verið knýttir at verkætlanini. Ann Ellefsen og Kristinbjørg Høgnesen gjørdu tekstasavnið í fyrstu bókini, Kirsten Brix hevur skrivað ymiskar ástøðiligar partar, funnið viðkomandi tekstdømi til ástøðið og tekstir til savnið í aðru bók. Harumframt hava Sigrun Hjalmarsdóttir og Katrin Reinert týtt og tillagað brot úr bókum hjá Norsk Gyldendal.

Tilfarið í *Sýni & Dýpi* byggir á fleiri aðrar útgávur, sum Nám áður hevur givið út. Fyrsti parturin av bókmentasøguni byggir t.d. partvíst á *Føroyska bókmentasøgu 1* (2011) eftir Maluna Marnersdóttur og Turið Sigurðardóttur. Málløran og málsøgan byggir m.a. á *Mállæru* (1997) eftir Paulivar Andreasen og Árna Dahl og á *Grannamálið fyri vestan* (1987) eftir Árna Dahl. Og Kirsten Brix, sum hevur skrivað partin um skaldskap av mannamunni, hevur líknandi tekst í útgávuni *Les Ástøði*.

Tey bæði fyrstu bindini í heildini eru liðug og eru tøk hjá lærarum og næmingum at keypa og brúka. Triðja og seinasta bindið er í gerð, og ætlanin er, at partar av triðja bindinum verða latnir upp til royndarnýtslu seinni í skúlaárinum 2017-2018.

Fyri okkum sum ritstjórar hevur tað stóran týdning, at vit fáa afturmeldingar frá lærarum og næmingum. Tað er lætt at rætta skeivleikar í sBókunum, og tí ger tað beinanvegin mun, um lærarar boða frá. Og afturmeldingar um torleikastig, teksttyngd og áhuga geva okkum íblástur til framhaldandi menning av bókunum.

# Marknaðarlæra – lærubók á miðnámi

Olav Absalonsen

**Í 2016 kom triðja útgáva av bókini *Marknaðarlæra*, sum Annfinnur Zachariassen hevur skrivað. Bókin er ein fongur fyri okkum á miðnámi, sum ofta breggja okkum av tvørfakligari og almennari læring. Bókin er væl egnað til fyrsta og annað ár á miðnámi – ikki bara í sølubúskapi, men eisini í samfelagsfrøði, føroyskum, virkisbúskapi, altjóða búskapi og lærlinga-skeiðum ikki minst.**

Triðja útgáva av *Marknaðarlæru* er nógv broytt í mun til aðru útgávu, sum kom út í 2012. Bókin er, sum navnið sigur, ikki bara marknaðarførsla. Marknaðarlæra snýr seg um nógv meira enn tað. Her er søga, mentan og búskapur við í heildini. Bókin hevur ein breiðari sjónarring, enn so mangar aðrar lærubøkur, vit nýta á miðnámi.

## Hvussu bókin varð til

Í eftirorði skrivar Annfinnur, sum hevur drúgvar royndir í handilsvinnuni, og sum var lærari á handilsskúlanum frá 1975 til 2005, hvussu bókin er vorðin til. Tann 29. oktober 1983 kom ein bóklingur undan kavi undir heitinum *Handil og søla*, og var hann 50 síður í A4 stødd. Annað umfar í tilgongdini er í 1992, tá ið Føroya skúlabókagrunnur gevur lærubókina *Søla og tænasta* út, ætlað FHS-næmingum í lærugreinini Søla og tænasta. Í 2002 er tilfarið endurskoðað, og nú gevur Skúlabókagrunnurin út bókina *Marknaðarlæra* við undirheitinum *Søla og tænasta*. Lopið til næstu útgávu er aftur 10 ár, og Skúlabókagrunnurin er lagdur saman við aðrar stovnar undir heitinum Nám. Útgávan í 2012 kundi lesast á www.snar.fo. Triðja útgávan í 2016 kann nú lesast á www.snar.fo.

## Globalisering í fornøld

Ein styrki við bókini er, at marknaðarlæran verður sett í eitt søguligt og samfelagsligt samanhang. Tveir teir fyrstu kapitlarnir eru søguligt afturlit, og lýsa teir, hvussu treytirnar fyri handli og øðrum vinnuligum virksemi eru broyttar frá fornøldini til okkara tíð. Fyri at handil skal bera til, er neyðugt við onkrum felags virðismáti, sum varð nýtt í sambandi við býtishandil, áðrenn silvurmyntir komu fram um 600 f.K. í Lítla-Asia, Egyptalandi, Mesopotamia, India og Kina. At myntir blíva vanligir so nógvastaðni næstan um somu tíð, bendir á, at globaliseringin byrjaði langt fyri okkara tíðarrokning. Summi nøvn á gomlum myntum eru væl kend: shekulin í Mesopotamia, drakman í Grikkalandi og denarurin í Róm.

## Italskir handilsbýir

Tað er áhugavert at lesa, at fyrstu pengaseðlarnir vórðu brúktir í Kina longu í níggindu øld ella fyrr, men at teir fyrstu í Evropa vórðu ikki gjørdir fyrr enn í 17. øld. Tá ið Marco Polo (1254-1324) kom aftur til Evropa úr Kina og fortaldi, at har brúktu tey pengar av pappíri, vildu fólk ikki trúgva honum. Tey hildu, at ikki ber til at gjalda við nøkrum, sum einki virði hevur. Handilssamband hevði verið ímillum Evropa og Fjareystur síðani í fornøld. Sokallaði Silkivegurin bant Rómaríkið og Kina saman fyri okkara tíðarrokning. Silkivegurin var ein handilsleið við dugnaligum millumhandlarum. Og tað var henda sama vegin, sum Marco Polo og aðrir nýttu í trettandu øld.

Frá tíggindu øld mentust italskir býir til máttmiklar handilsbýir. Umstøðurnar vóru til, at hesir býir vunnu sær serstøðu sum millumhandlarar ímillum Miðeystur og Evropa. Støðan, sum hesir býir høvdu, ávirkaði europeiska mentan í øldir, tí har sum kapitalur rúgvast upp, tekur mentan seg upp: Peningur og virksemi amast hvørt upp á annað.

## Hansasambandið

Um okkara leiðir hevði Hansasambandið mestsum alt ræði á handli í Eystrasalti og Norðsjónum í fjúrtandu og fimmtandu øld. Hetta var ein felagsskapur hjá dugnaligum keypmonnum í Lübeck, Hamburg og øðrum týskum býum. Hesir býir fingu tí navnið Hansastaðir. Líkt er til, at hansakeypmenn hava handlað við føroyingar, tí í 1294 varð sáttmáli gjørdur millum Hansasambandið og Norra um, at hansakeypmenn ikki máttu handla við Ísland, Føroyar, Hetland og Orknoyar, ið tá vóru norsk skattlond.

Grundgevingarnar fyri hesum forboði vóru einfaldar. Í 1271 hevði norski kongurin Magnus Hákunson eftir umbøn frá føroyingum bundið seg til at hava í minsta lagi tvey hóskandi skip siglandi millum Føroyar og Bjørgvin, ið longu tá var stórbýur. Men um aðrir keypmenn sluppu at handla við Føroyar, so varð grundarlagið tikið undan hesi sigling, og tað fór ikki at loysa seg hjá kongi at hava tvey skip siglandi millum londini.

Tá sum nú hevði kapitalur ikki bara handilsligt vald, men eisini politiskt vald, og í 1361 var Hansasambandið vorðið so sterkt mótvegis norska konginum, at hansakeypmenn fingu somu rættindi at handla við skattlondini fyri vestan sum norsku keypmenninir í Bjørgvin.

## Einahandil og loynihandil

Sum frá leið, viknaði Hansasambandið, og frá 1524 var aftur bara ein handil í Føroyum. Í einahandilstíðini vóru loynihandilsskip ofta í Føroyum, og freistandi var hjá fólki at keypa frá teimum. Høvundurin umtalar loynihandilin í einahandilstíðini og Gablatíðina frá 1662 til 1709, sum var ein ring tíð í Føroyum. Eisini viðger hann spurningin, hví tað tók so drúgva tíð at fáa fríhandil, eftir at hugskotið kom fram í 1790, til einahandilin varð tikin av í 1856.

## Íverksetarar

Tá ið Føroyar um síður fingu frían handil frá 1. januar 1856, broyttust vinnumøguleikarnir munandi. Íverksetarar vóru tá sum nú, og tá ið møguleikin býðst, taka teir av. Ein av hesum var Dánjal Haraldsen, sum saman við brøðrum sínum Peturi og Niclasi keypti fyrstu sluppina til Føroyar í 1872. Dánjal skrivar soleiðis í Dimmalætting 19. januar 1878:

> ***Fiskiskapur við deksførum***. *Tá ið eg eri sannførdur um, at tað hevði verið til stórt gagn fyri okkum føroyingar, um vit løgdu meira dent á fiskiskap við deksførum enn higartil, vil eg við hesum upplýsa um, hvussu tað hevur roynst hjá mær, síðani eg í 1872 saman við brøðrum mínum byrjaði fiskarí við skipi eftir í nógv ár at hava róð út við báti.*
>
> *Tað eru mong ár síðani, at vit settu okkum sum mál einaferð at verða førir fyri at útvega okkum eitt skip til fiskiskap, tí vit sóu dagliga, hvussu hetlendingar, belgiarar og fransmenn við teirra fiskiskipum ofta eftir fáum árum endurvunnu kapitalin, teir høvdu sett í skipini, við fiskiskapi her undir Føroyum, meðan vit føroyingar máttu gera okkum nógvan ómak at rógva út við bátum fyri at vinna eitt sindur meira enn til dagligt uppihald. Í 1872 keyptu vit, sum nevnt, eitt skip í Onglandi fyri umleið 7.000 krónur. Hetta var ikki av bestu fiskiskipum, men tá ið tað var bíligt, og vit ikki kundu útvega størri fígging, noyddust vit fyribils við tað.*

Greinin er nógv longri enn hetta. Hann skrivar, at hóast havarí í 1873 við nógvum útreiðslum til umvælingar, hava teir longu vunnið ein triðing av kapitalinum aftur umframt tað, at teir sum fiskimenn við skipinum hava havt størri inntøku, enn teir nakrantíð høvdu havt av útróðri við báti. Greinin, sum endar við hesum orðum, vísir, at maðurin, sum skrivar, er ikki bara íverksetari, men eisini slóðbrótari:

> *Um hesar reglur kunnu gera tað, at vit føroyingar fara at fiska meira við deksførum enn higartil, havi eg nátt ætlan mínari við teimum.*

Annað dømi um íverksetara í 19. øld er Símun í Vági. Hann hevði lært til bakara á flatlondum, har hann eisini hevði lært at bryggja, og lat í 1888 bakarí upp norðuri í Vági. Hann bakaði annanhvønn dag, og annanhvønn dag róði hann til aðrar bygdir at selja. Sama ár stovnar hann landsins fyrsta bryggarí, Føroya Bjór.

Ein triði er Ólavur á Heygum kongsbóndi í Vestmanna, sum í 1901 heitti á Løgtingið at fáa telefonlinju millum Tórshavn og Vestmanna. Tingmenn vóru ikki samdir um hetta, og einki spurdist burturúr hesum. Ólavur søkti tí sjálvur danska statin um loyvi at leggja linjuna og dríva hana. Hetta loyvið fekk hann í eitt tjúguára tíðarskeið, og linjan var liðug í 1905. Tá raknaði Løgtingið við og gjørdi av at leggja linjur um alt landið.

Nógv onnur dømi eru um íverksetarar hesa tíðina og serliga seinni, eisini um fyritaksemi, sum ikki eydnaðist. Men tað, sum eydnaðist, hevur verið við til at menna samfelagið til tað, sum tað er í dag. Tað var Joseph Schumpeter, ið teoretiseraði týdningin, sum íverksetarin hevur fyri búskapin (sí grein í Miðnámsriti 2014, s. 123-126). Bókin *Marknaðarlæra* snýr seg mest um nútíðina við marknaðarbúskapi og teimum treytum, sum hann hevur við sær.

## Hvussu bókin er bygd upp

Eftir tann søguliga partin í bókini koma tríggir kapitlar, sum snúgva seg um marknaðar-viðurskifti, og sum fyrireika lesaran til tað, sum kemur í seinnu helvt av bókini. Hesi viðurskifti eru treytir hjá brúkarum, treytir hjá fyritøkunum og kappingarumstøður. Hesin bygnaður minnir ikki sørt um aðrar lærubøkur í búskapi.

Eftir hetta koma fýra kapitlar, sum eru um marknaðarførslu. Her verður nógv gjørt burtur úr, hvussu fyritøkan kann laga seg eftir umstøðunum og broytingum í umheiminum. Ein av kapitlunum eitur Marknaðartileggjan. Ólík mongum øðrum bókum í hesum evni er *Marknaðarlæra* kritisk móti kenslubornari og villleiðandi reklamu. At enda eru tveir kapitlar um ávikavist fíggjarstýring og løgfrøði, og er tað fyri at vísa, at lívið er tvørfakligt.

## Fakmál

Í einari lærubók ræður um at hava beinrakin orð fyri faklig hugtøk, og tað er eisini umráðandi, at sama orð ikki verður brúkt um tvey ymisk hugtøk, tí tað hevði gjørt tað truplari at læra. Í *Marknaðarlæru* er tí neyðugt at brúka fremmandaorð sum branding, konsept, segmentering og sesong.

Hinvegin eru eisini nógv serføroysk orð í bókini. Tey flestu eru heppin, tí tey hava samljóð við máloyrað hjá okkum. Eingin kann til dømis vera í iva um, hvat gerandisvøra er. Sertokki er annað dømi, sum rakar seymin á høvdið, og sum lýsir fyribrigdið, at brúkari ger mun á vørum ella tænastum og hevur serligan tokka til ávíst merki, vøru ella virki. Um hugtakið slóðari verður henda søgan endurgivin:

> *Sonn søga sigur frá heimskenda sjónleikaranum Clark Gable, sála, at hann í einum leikparti læt seg úr skjúrtuni og var í ongari undirtroyggju. Hetta fekk álvarsamar avleiðingar fyri tey, ið gjørdu undirtroyggjur.*

## Skeri eg teg her, so missi eg teg har

Hvør fuglur syngur við sínum nevi, og rithøvundar hava – og skulu hava – egnan stíl. Annfinnur dugir væl at taka til, og brúkar ofta orðatøk og beinrakin orðafelli at lýsa tað, sum hann vil siga. “Skeri eg teg her, so missi eg teg har” verður brúkt at lýsa, hvussu brúkarin hugsar, tá ið hann skal velja í víðari kapping. Brúkarin hevur avmarkaða keypiorku, og á ein hátt kappast allar vørur um hesa keypiorku.

Sama orðatak kundi verið brúkt at lýst hugtakið offurkostnað í búskapi. Eitt virki, sum selur, skal eins og brúkarin taka avgerðir, og offurkostnaður er kostnaðurin fyri at seta eina avgerð í verk, har mistur vinningur av hesi avgerð er roknaður upp í offurkostnaðin.

## Eitt er kort at lesa, annað skipa at føra

Í marknaðarførslu verður orðið konsept brúkt í sambandi við ætlan og framferðarhátt, tá ið virkið skal laga seg til marknaðin. Her minnir høvundurin á orðatakið "Eitt er kort at lesa, annað skip at føra", tí tað er ikki nóg mikið at kenna kósina, men tað ræður um at duga at seta segl eftir umstøðunum og at stýra millum boðar og íður.

Vit kunnu brúka somu hugsan um skúlalærdóm sum heild. Eyðmýkt er at kenna seg sjálvan, verður sagt, og eyðmýkt er ein fortreyt fyri at læra. Nú ein dagin segði ein maður fyri mær, at hann hevði lært 10 ferðir so nógv eftir einum ári í arbeiði, sum hann hevði lært í 5 ár á hægri lærustovni. Kanska gjørdi hann av, men hann man hava verið opin fyri at læra meira eftir at hava lokið prógv við umleið 300 ECTS'um. Onnur við hægri útbúgving kundu helst lært – og lært – av hesum hugburði. At ein lærubók á miðnámi minnir lesaran á, at tað er nógv eftir at læra, tá ið hann hevur fingið prógvið í hondina, ger ikki bókina verri.

# Marknaðarbúskapur

Olav Absalonsen

**Marknaðarkreftir eru ikki natúrulógir, hóast hetta mangan er fatanin. Atferðin hjá brúkarum er irrationell, instinktiv, vanabundin og viðkvom fyri manipulativum boðskapum, og um seljari og keypari ikki hava samsvarandi vitan, virkar marknaðurin illa.**

## Útboð og eftirspurningur

Í búskaparfrøði nýta vit ofta myndlar at lýsa ávís viðurskifti í búskapinum. Til dømis tosa vit um ymisk sløg av marknaði við nógvari, lítlari ella ongari kapping; á útboðssíðuni kunnu vera nógvir ella fáir, sum bjóða vøru út til sølu, og á eftirspurningssíðuni kunnu eisini vera nógvir ella fáir, sum møguliga eru áhugaðir at keypa. Frá tí neoklassisku búskaparfrøðini kom myndilin um útboð og eftirspurning. Er prísurin høgur, verður útbjóðaða mongdin størri, tí tá fæst størri inntøka og harvið størri avlop. Í teoriini verður sagt, at útboðið er ein vatnrøtt samanlegging av marginala kostnaðinum hjá øllum fyritøkunum á marknaðinum.

Eftirspurningur kemur frá teimum, sum kunnu fáa nyttu burtur úr vøruni ella tænastuni. Er nyttuvirðið hjá einum keypara størri enn prísurin, loysir tað seg hjá honum at keypa. Av tí at nyttuvirði er eitt subjektivt virði og ikki tað sama hjá øllum, verður eftirspurda mongdin minni, hægri prísurin er. Hetta er í stuttum grundreglan í myndlinum. Har sum útboð og eftirspurningur møtast, er marknaðarprísurin og marknaðarmongd. So henda broytingar javnan í eftirspurningi og útboði. Eftirspurningurin broytist til dømis av broytingum í keypiorku ella nýtsluvanum; og útboðið broytist til dømis av broytingum í kostnaðinum ella produktivitetinum.

## Veblen-effektin

Myndilin um útboð og eftirspurning er hentur at lýsa, hvussu ein marknaður kann virka undir ávísum treytum. Men hann er ikki so væl egnaður einsamallur sum amboð hjá fyritøkum, sum skulu marknaðarføra og selja vøru og tænastu. Í teimum gomlu neoklassisku myndlunum er ein vanlig treyt, at alt annað er óbroytt, tá ið ein variabul verður broyttur, og tað er fyri at lýsa, hvussu hesin variabulin ávirkar annan variabul. Men í veruleikanum er alt annað ongantíð óbroytt. Og brúkaraatferð er heldur ikki rationell, sum annars er ein treyt í nógvum myndlum.

Longu síðst í nítjandu øld fanst Thorstein Veblen (1857-1929) at neoklassisku búskaparteoriini, tí hon var grundað á óveruliga hugsan um brúkaraatferð, og førdi tí til skeivar

niðurstøður um búskapin sum heild. Hann førdi fram, at mannaatferð er í stóran mun stýrd av instinktum og vanum. Til dømis vísti hann á, at brúkaraatferð kann vera stýrd av einum ynski um viðurkenning ella prestisju. Hann staðfesti, at luksusvørur kunnu verða meira eftirspurdar, um prísurin hækkar, og tað er ikki í samsvar við ta vanligu neo-klassisku fatanina, at eftirspurningskurvan altíð hevur negativt hall. Seinni fekk tann sosiala keypsorsøkin at keypa dýra vøru, tí at hon er dýr, heitið veblen-effektin, og er hon væl kend í marknaðarlæru í sambandi við branding. Ein onnur síða av veblen-effektini, sum ikki er beinleiðis sosial, er, at brúkari kann halda, at ein vøra er dýrari enn ein onnur, tí at dygdin er betri. Um eitt skeið, sum verður boðið út, er bíligt, kann vera, at fólk halda skeiðið vera vánaligt; men er tað dýrt, kunnu fólk halda tað vera gott, hóast dygdin er júst tann sama.

## Konventionellur vísdómur

Ein annar búskaparfrøðingur, ið fanst harðliga at búskaparfrøðini í samtíðini, var John Kenneth Galbraith (1908-2006). Eins og Thorstein Veblen var hann ikki analytiskur í skriving, men hevði ein satiriskan stíl. Til dømis brúkti hann hugtakið konventionellur vísdómur, tá ið hann fanst at vanahugsan. Sambært vanliga góðtiknum búskaparligum myndlum hyggja brúkarar eftir, hvørjar vørur eru at fáa á marknaðinum, og velja so tað, sum hóskar teimum best. Men Galbraith metti, at pílurin ofta vendir hinvegin: fyritøkur skapa fyrst vørurnar, og síðani ein marknað fyri hesar vørur. Flestu búskaparfrøðingar viðganga, at fyritøkur høvdu útnyttað brúkarar soleiðis, um tær kundu, men ivast í, um tað ber til í longdini, tí um vinningur er at fáa á henda hátt, fara virkini at kappast um hann, og so man útboðsprísurin fara at verða brúktur í kappingini.

Onkursvegna hava fólk, ið arbeiða við marknaðarførslu, leingi vitað, hvussu brúkarar bera seg at. Tak til dømis hugtøkini informativ reklama og manipulativ reklama. Í tráð við hugsanina hjá Galbraith er informativ reklama neyðug, fyri at brúkarin skal finna júst tað, sum hann hevur brúk fyri; tann manipulativa reklaman hinvegin verður brúkt at lokka brúkarar at keypa vøru ella tænastu, sum teir ikki hava brúk fyri. Skilnaðurin ímillum ta informativu og ta manipulativu reklamuna kann tó vera trupul at taka støðu til, tí ein reklama kann hava meir og minni av báðum. Eitt annað er spurningurin, nær ein eggjan til at keypa er ein roynd at yvirtala, sannføra ella manipulera. Summi vilja vera við, at tað er bara brúkarin sjálvur, sum ger av, um hann hevur brúk fyri vøruni, og um hon hevur virði fyri hann; eftir hesum er tað tann subjektiva nyttan, ið er avgerandi. Onnur eru ósamd og vísa á, at so kann tað enda heilt galið. Galbraith skrivaði til dømis soleiðis í 1958:

> *Fleiri fólk doyggja í USA av at eta ov nógv enn ov lítið. Fyrr var vanligt, at fólkið legði trýst á útboðið av matvørum, men nú leggur útboðið eirindaleyst trýst á fólkið.*

## Atferðarbúskapur

Seinni í 20. øld vaks ein nýggj grein fram innan búskaparfrøði: atferðarbúskapur. Daniel Kahneman og Amos Tversky, sum arbeiddu saman, gjørdu nógvar kanningar um, hvussu fólk taka búskaparligar avgerðir. Teir koma til, at fólk flest hugsa ikki sum *homo economicus*. Til dømis hava vit ikki symmetriskan hugburð um vinning og miss – vit eru meira sensitiv fyri missi, og royna sostatt at sleppa undan risiko; vit minnast betur tær feskastu upplivingarnar og hendingarnar, og okkum dámar ikki broytingar; vit vilja heldur varðveita tað, sum vit eiga, enn býta tað um við okkurt annað, og vit hava ilt við at sleppa tí, sum vit hava trúð leingi. Niðurstøðurnar hjá teimum standa í andsøgn til ta neo-klassisku fatanina, at vit taka rationellar avgerðir.

Robert Frank endurgevur kanningar, sum stuðla upp undir úrslitini hjá Kahneman og Tversky, og sum avdúka, at eisini fólk, ið hava lisið búskaparfrøði, kunnu hava trupult við at brúka búskaparlig amboð í verki. Sum dømi nevnir hann offurkostnað. Offurkostnaður av einari avgerð er virðið á øllum, tú mást ofra fyri at seta avgerðina í verk – íroknað virðið á mistum møguleikum.[1] Hóast offurkostnaður er eitt av mest grundleggjandi hugtøkunum í búskaparfrøði, fellur tað okkum ónatúrligt at samanbera virði á tí, vit skulu av við, við virði á mistum møguleikum, og samsvarar tað við niðurstøðuna hjá Kahneman.

At Daniel Kahneman, sum er útbúgving sálarfrøðingur, fekk Nobel prísin í búskaparfrøði í 2002, er tekin um, at búskaparfrøðin nú tekur ímóti vitan frá øðrum samfelagsligum vísindagreinum (Amos Tversky doyði í 1996, og fekk tí ikki lut í heiðrinum). Atferðar-búskapur er eitt øki, har búskaparfrøði og sálarfrøði møtast.

## Asymmetrisk informatión

Eitt fyribrigdi, sum kann gera tað trupult at keypa og selja, er, tá ið annar parturin hevur *inside* vitan, sum hin ikki hevur. Hetta sigur seg næstan sjálvt. Men tað var ikki fyrr enn umleið 1970, at búskaparfrøðin bleiv greið um, hvussu stórt og ógvusligt hetta vandamálið kann vera. Tað var um hetta mundið, at George Akerlof brúkti marknaðin fyri brúktar bilar at lýsa, hvussu tað kann ganga, tá ið seljarin veit nógv um dygdina á brúkta bilinum, og keyparin veit lítið. George Akerlof vísir á, at hetta er ikki ein marknaður, har fólk verða snýtt, men tað er nógv verri enn tað. Hann lýsir ein marknað, sum átti at verið til, men sum ikki er, tí hann verður undirgrivin av inside informatión. Keyparar vilja ikki keypa, um teir ikki fáa prógv fyri, at teir fáa virði fyri prísin, og seljarin kann ikki geva teimum hetta prógv.

Marknaður fyri brúktar bilar er bara eitt dømi um *inside* vitan. Eitt annað er útleigan av íbúðum við innbúgvi. Innbúgvið í hesum leigaðu íbúðum er ofta vánaligt í dygd. Hví man

[1] Á eingilskum eitur tað *opportunity cost*.

tað vera? Leiguprísurin verður ofta avtalaður út frá sjónskum eginleikum sum stødd, stað og øðrum; men so eru eginleikar, sum eru verri at fáa eygað á – eitt nú innbúgv. Útleigarin hevur lítlan áhuga í at keypa dýrar og góðar møblar, tí tað er ikki tað, sum ein møguligur leigari hyggur at, áðrenn hann flytur inn, og tískil ikki nakað, sum hann vil gjalda fyri. Sostatt verður tað ein marknaður fyri leiguíbúðir við vánaligum innbúgvi, men eingin marknaður fyri íbúðir við dygdargóðum møblum.

Tim Harford nevnir eitt triðja dømi, sum er, at *inside* vitan ger tað torført at fáa eina góða máltíð í ávísum støðum í stórbýum, har nógv ferðafólk eru; sum dømi nevnir hann Leicester Square í London og Times Square á Manhattan. Við nøkrum fáum undantøkum gjalda ferðafólk høgar prísir fyri hálvvánaligan mat. Ferðafólkini keypa, tí tey hava ikki hóming av, hvar tey skulu finna nakað frægari, hóast tað er at finna í onkrum síðugøtum rímiliga nær við. Góðar matstovur eru har, sum tey staðkendu vita, at tær eru, soleiðis at tey koma aftur. Ferðafólk hinvegin skulu bara hava eina máltíð, og koma kanska ikki aftur allíkavæl. Viðhvørt verður hetta fyribrigdið kallað asymmetrisk informatión, tí keypari og seljari hava ójavna vitan.

Í 2001 fekk George Akerlof Nobel prísin í búskapi saman við Michael Spence og Joseph Stiglitz. Meðan George Akerlof vísti á tvørleikarnar við asymmetriskari informatión, førdi Michael Spence fram, at tann parturin, sum situr inni við informatiónini, kann kunna hin partin á ein hátt, sum hin parturin kann hava álit á. Joseph Stiglitz lýsti vandamálið frá hinari síðuni við at vísa á møguleikar, sum persónurin, ið ikki hevur informatiónina, kann útvega sær hana.

Aðrir hava nýtt hugsanirnar hjá Michael Spence at vísa á, hví fyritøkur brúka ómetaliga stórar upphæddir til reklamuherferðir, sum ikki hava nakað informativt innihald. Tak til dømis eina sjónvarpsreklamu fyri Coca-Cola. Tann einasta informatión, ið vit sum møguligir brúkarar kunnu fáa burtur úr einari tílíkari lýsing, er, at hon má vera dýr at gera, og at Coca-Cola tí man ætla at halda fram við virkseminum.

## Við lóg skal land byggjast

Nógv av teimum viðurskiftum, ið eru umrødd omanfyri, hava sett dám á lógarverkið hjá okkum. Tak til dømis kappingarlógina, ið hevur sum endamál, at kapping skal fremja samfelagsligt gagn fyri fyritøkur og brúkarar. Lógin setur forboð fyri at gera kappingar-avlagandi avtalur ella at misnýta ráðandi støðu. Um vit seta hetta í búskaparligt samanhang, kunnu vit siga, at ein handil eigur at vera fyrimunur fyri bæði keypara og seljara, soleiðis at tað gagn, sum brúkarin fær av keypinum, er meira vert enn prísurin, hann skal gjalda; og somuleiðis skal útbjóðarin hava ein prís, sum er størri enn tað, sum vøran hevur kostað honum. Men um útbjóðarar taka seg saman at minka um kappingina og trýsta

prísirnar upp, taka teir tað mesta av fyrimuninum, og tað, sum fellur brúkarunum í lut, verður minni.

Annað dømi er marknaðarføringslógin, ið er gjørd fyri at menna góðan marknaðarføringssið, sum millum annað merkir, at marknaðarføring eigur ikki at verða nýtt at avlaga atferð hjá brúkarum. Til at verja brúkaran er Brúkaraumboðið, ið er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur eftirlit við, at lóg um marknaðarføring verður hildin. Her fær ein varhugan av, at lógarsmiðirnir vilja byrgja fyri manipulativari reklamu, og at teir geva John Kenneth Galbraith rætt, tá ið hann fanst at vinnuni fyri óetiska marknaðarførslu.

Triðja dømi er keypslógin (vanliga rópt keypilógin), ið skilir ímillum handilskeyp og brúkarakeyp. Handilskeyp er handil ímillum fyritøkur; brúkarakeyp er handil, har brúkari keypir frá vinnurekandi. Skilnaðurin er gjørdur fyri at verja brúkaran. Í leigulógini um útleigan av bústøðum síggja vit ábendingar um tað sama. Tað fær ein at hugsa um tað, sum George Akerlof og aðrir føra fram um asymmetriska informatión í handli.

## Keldur


Annfinnur Zachariassen, *Marknaðarlæra – Søla og tænasta*, 3. broytta útgáva, 2016.

Barry Schwartz, *The Paradox of Choice: Why More Is Less*, Harper Perennial, 2004.

Daniel Kahneman, *Thinking, Fast and Slow*, Penguin Books, 2011.

David Orrell, *Economyths: Ten Ways That Economics Gets it Wrong*, Icon Books, 2010.

John Kenneth Galbraith, *The Affluent Society*, Fortieth Anniversary Edition, 1998.

Jonathan Aldred, *The Skeptical Economist: Revealing the Ethics Inside Economics*, Earthscan, 2009.

Michael Goodwin, *Economix: how and why our economy works (and doesn't work) in words and pictures,* Abrams ComicArts, 2012.

Robert Frank, *The Economic Naturalist: Why Economics Explains Almost Everything*, Virgin Books, 2007.

Robert Frank, *The Return of the Economic Naturalist: How Economics Helps Make Sense of Your World,* Virgin Books, 2009.

Tim Harford, *The Undercover Economist*, Abacus, 2006.

# Próvtalsjagstran oyðileggur fakligheitina

Miriam Brems í Politiken 1. juli 2016
Óli Petersen týddi

**“Eg skammist um, at eg ikki tók av at blíva klókari”. Soleiðis sigur Miriam Brems, sum bara fekk 12-tøl, tá hon gekk á miðnámi.**

Tá eg fyri tveimum árum síðan fekk handað miðnámsprógv, fekk eg tretivu 12-tøl av tretivu møguligum. Men fyri at siga sum er, so var mín fakligi førleiki í fleiri av lærugreinunum ikki so góður.

Tá ið eg byrjaði í 0. flokki í fólkaskúlanum fekk eg at vita, at vit altíð skuldu hava 10 spískar blýantar í penalhúsinum. Tá ið eg 10 ár seinni skuldi byrja á miðnámi, vóru tað ikki longur blýantarnir, men albogarnir, sum skuldu spískast og brúkast, so at vit lættari kundu standa okkum í kapprenningini eftir góðum próvtølum.

Hóast tikið verður til, at tað er tann besti, sum kemur fyrst, er tað ikki vist, at vit fáa teir bestu studentarnar um mállinjuna trý ár seinni.

Próvtalsjagstranin elur nevniliga til eitt sjúkt læriumhvørvi, har tað ikki longur snýr seg um at koma niður í djúpdina í einstøku lærugreinini, men heldur at skoyta omaná fyri at fáa so nógv 12-tøl, sum til ber. Slík atferð kann neyvan undra nakran, tá hugsað verður um tað stóra trýstið, næmingar eru undir, tá ið ræður um krøv til próvtøl. Hvørja viku fáa vit stílar og rapportir við próvtølum aftur frá lærarunum, og hvønn einasta dag er eitt áhaldandi stríð í flokshølunum at hugtaka læraran, tí støðumetini hótta støðugt.

Tá ið vit í heilum skulu vigast og metast á henda hátt, eru vit so ella so til próvtøku hvønn dag á miðnámsskúlanum: Lærarin er ikki longur bara ein vegleiðari og eitt fakligt orakkul, nei, hann er eisini ein prívdómari, sum skal døma teg. Og vit vita jú øll, at tað ikki akkurát er við tað grøna próvtøkuborðið, at man spyr, hvussu integralrokningin hongur saman.

Avleiðingarnar eru nógvar. Tann sjónligasta avleiðingin er, at næmingarnir tora ikki at rætta hondina upp og seta ein fakligan spurning, tá ið teir ivast. Nei, so er heldur at bluffa, og lata sum um, at alt er í lagi, enn at avdúka sínar fakligu veikleikar, tí tað er hóast alt frægari at vera býttur enn at síggja býttur út. Aðrar avleiðingar eru eisini. Próvtalskapprenningin ger síðumannin, sum tú fyrr kundi sparra við um fakligar spurningar, til ein kappingarneyta. Albogarnir verða ikki bara brúktir, nei, notur verða hildnar tætt at kroppinum. Onki við at deila vitan og síni gullkorn, tá okkurt er greinað í einum bólkaarbeiði, tí set nú fyri, at ein annar fekk loyvi til at leggja fram kjarnuna og høvuðsniðurstøðurnar fyri lærararanum og harvið fáa alla æruna og við hesum eitt høgt próvtal?

Áhaldandi kappingin um at síggja best út ger okkum heilt einfalt til vánaligari næmingar. Í okkara innanhýsis dysti fyri at verða fyrst um mállinjuna er tað, sum vit hava gloymt, hvørjum vit renna eftir. Einaferð, tá ið vit byrjaðu í skúlanum, var tað helst faklig vitan og innlit, sum lógu til grund fyri flottu próvtølunum, sum vit jagstraðu. Men nú er tað sum um, tað er líka mikið, um tað er ein veruligur fakligur førleiki handan próvtølini. Tølini í próvnum avdúka jú ikki, hvussu 12-tølini eru fingin til vega, ella hvør verulig dygd liggur aftanfyri.

Tað er sjálvandi lætt at geva okkum næmingum skyldina. Men eg haldi ikki, at man kann brigsla næmingunum. Lærararnir kunnu saktans halda eina prædiku um, at vit hvørki kunnu ella skulu avmarka okkara vitan til eitt tal. Veruleikin er bara, at nettupp tað talið, sum stendur niðast á okkara miðnámsprógvi, avger okkara framtíð. Hetta talið hevur maktina til at lata dyrnar upp til okkara dreymaútbúgving, men hevur eisini megina til brutalt at klamsa hurðina í høvdið á tær.

Loysnin er sjálvandi ikki at beina fyri próvtølunum. Men í gerandisdegnum verða vit noydd til at seta fakligheitina í hásæti og at skapa eitt trygt læringsrúm, har næmingurin saktans kann ivast og hevur loyvi til at seta býttar spurningar, so ein gerst dugnaligari, uttan støðugt at verða mátaður og vigaður.

Á nøkrum miðnámsskúlum hava royndir verið gjørdar við, at flokkar ikki fáa próvtøl. Ein avleiðing er, at trivnaðurin í hesum flokkum er betri, og miðaltølini til próvtøkurnar eru eisini farin upp, vísa kanningar. Orsøkin til góðu úrslitini er, at man er givin við at geva næmingunum próvtøl í tíð og úrtíð, men er heldur farin yvir til at geva konstruktivt feedback og at hava samrøður við næmingar, og bíða við at geva próvtøl til endaligu royndina.

Tað kann væl vera, at politikarar ikki hava fangað hetta enn. Men í Jútlandi, har eg eri uppvaksin, er tað gomul vitan, at ein grísur verður ikki tyngri av at verður vigaður. Hinvegin kanst tú vera vísur í, at grísurin vigar minni, um hann hvønn einasta dag skal upp á vektina. Soleiðis er tað eisini við okkum næmingum. Próvtalskapprenningin sker vitan at rivjabeinunum, og máar fakliga støðið niður á miðnámi. Tá ið eg í dag síggi mítt miðnámsprógv, eri eg enn stolt av mínum innsatsi og av úrslitinum. Takkað veri nøkrum dugnaligum og inspirerandi lærarum, havi eg hóast alt lært rættiliga nógv.

Men eg skammist yvir, at eg ikki tók av møguleikanum at læra meira og fáa størri vitan og innlit fyri eitt neyðars 12-tal. Tað er rætt, at eg fekk tríati 12-tøl við mær til hús. Men eg hevði lært meira, um eg hevði torað at býtt okkurt av teimum um við eitt 7-tal ella 10-tal.

# Skulu vit framhaldandi duga fremmandamál í Føroyum?

Maria Heradóttir

**Týdningurin av at menna millummentanarligar førleikar hevur ongantíð verið so stórur sum nú. Tí er tað ein mótsøgn, at øll fremmandamál undantikið enskt eru fyri so stórari afturgongd í skúlunum í Føroyum sum nú, tá mest sjálvsagda leiðin til hesar førleikar gongur ígjøgnum fremmandamálini. Her má vend koma í sum skjótast.**

## Fremmandamál eru førleikagevandi

Grundleggjandi spurningurin, hvussu vit útbúgva yngra ættarliðið til størv, sum enn ikki eru til, og til menniskju við førleikum at fóta sær hóast alsamt broytandi tíðir, hevur ført við sær, at skúlamyndugleikar hava flutt fokus frá pensum til førleikamál. Førleikar til framhaldandi at menna og útbúgva seg, førleikar at tillaga seg, førleikar at samstarva, førleikar sjálvstøðugt at ogna sær vitan og brúka hana í nýggjum samanhangum. Lyklaorðið eitur nýhugsan. Vit skulu bróta upp úr nýggjum, endurhugsa tað gamla, finna og brúka nýggja vitan í verki. Tað eitur seg, at Føroyar skulu hava fleiri bein at standa á og eiga lut í altjóða kappingini.

Í Føroyum fara vit fullkomiliga av kós í okkara tillagingum til framtíðar avbjóðingar, um grundleggjandi førleikar sum tað at duga fremmandamál mál gleppa okkum av hondum. Tað er ein sannroynd, at fremmandamál eru við til at lata hurðar upp til nýggjar møguleikar, nýggjan íblástur, nýggja fatan og nýtt innlit. At læra mál noyðir okkum at síggja úr øðrum sjónarhornum enn okkara egnu. Á tann hátt hava tey ein avgerandi leiklut í at stimbra júst tað, vit kalla nýhugsan.

Dugir tú eitt fremmandamál, fært tú innlit í eina fremmanda mentan, t.v.s. ein øðrvísi hugsanarhátt, onnur virði, fremmandar skipanir og harvið aðrar veruleikar. Tú lærir at síggja við øðrum eygum og at skilja aðrar mentanir innanífrá. Hetta gevur stórar møguleikar fyri at mennast sum menniskja, sum føroyingur og sum heimsborgari og kann eisini gerast spírin til nýggjar óendaligar møguleikar, sum bara bíða eftir at verða sæddir.

Tað fremmanda kann eisini varpa ljós á okkara egna. Ofta varnast tú ikki tað sermerkta við tíni egnu mentan, fyrr enn hon gerst sjónlig í ljósinum av tí fremmandu. Vilja vit branda og selja Føroyar, skal nýggj vitan til, sum vit enn kunnu vera blind fyri. Fyrimunirnir við slíkari spegling galda báðar vegir, sum aftur vísir á fyrimunir við at læra fremmandamál.

Harumframt er tað at duga fremmandamál eisini ein týdningarmikil førleiki í sjálvum sær sum samskiftismiðil. Tað er eyðsæð, at førleikar í fremmandamálum hava stórar fyrimunir við sær í altjóða høpi - ikki minst í nútíðar globaliseraða samfelagnum, sum vit eru partur av. Einki er heldur sum at samskifta beinleiðis á móðurmálinum hjá tí hinumegin borðið, sum greitt gevur fyrimunir fram um onnur.

## Enskt sum heimsmál

Enska málið hevur vunnið sær tign sum millumtjóða samskiftismál. Vit kunnu tí av røttum spyrja, um tað ikki er nóg mikið við einum fremmandamáli, sum røkkur so langt, sum enskt ger. Jú, enskt er eitt sera týdningarmikið mál at duga í dag, og við tí kemur tú eisini langt. Tó kann enskt ongantíð gerast betri sum samskiftismál enn móðurmálið, tá tað er møguligt. Tú fert tí altíð at eiga fyrimunin fram um onnur, um tú dugir málið. Eitt mark er sjálvsagt fyri, hvussu nógv mál vit kunnu leggja okkum eftir at læra, og enskt er í stóran mun málið, sum vit kunnu detta afturá, tá annað ikki ber til. Tað er tí einki minni enn eitt bragd at eiga eitt felags heimsmál, sum alsamt fleiri duga.

Hinvegin er tað júst tað plássið, sum enskt hevur fingið millum øll heimsins mál, sum ger, at vit fáa meir og meir tørv á eini mótvekt eisini. Enskt hevur lagt seg sum eitt filtur, sum vit hyggja ígjøgnum og spegla okkum í. Vit halda, at soleiðis sær verðin út, og soleiðis síggja vit út í mun til útheimin, men veruleikin er nógv fjølbroyttari enn so. Tað kann hugsast, at serliga smátjóðir sum okkara við egnum máli eru mest útsettar fyri hesum, tí okkara egna mál ikki fyllir líka nógv í almenna rúminum hjá okkum sum t.d. onnur heimsmál enn enskt gera í sínum heimlandi. Hetta er enn ein orsøk til at læra onnur fremmandamál enn bara enskt.

## Bókmentir hava týdning

Bókmentir, sum fremmandamálsundirvísingin vanliga eisini fevnir um, snúgva seg um menniskjalívið og viðgera evni, sum koma okkum við sum menniskju. Tær eru við til at menna okkum og at flyta mørk á ein hátt, sum bara bókmentir kunnu. Gamaní kunnu vit lesa nógvar týddar bókmentir á føroyskum og enskum, men tað slepst ongantíð uttanum, at nakað dettur burtur í týðingini, sum ikki kann verða endurgivið á øðrum málum.

## Fremmandamál í framtíðini

Í Føroyum skulu vit finna fyrimunirnar í at vera ein lítil tjóð og tilvitað gera teir til okkara styrki. Vit eru í tí hepnu støðu, at vit dagliga verða mint á, at vit ikki hava nóg mikið við okkum sjálvum. Í tí liggur ein ásannan, at vit sjálvsagt eisini skulu duga fleiri mál í framtíðini. Tó nýtist okkum ikki øllum at duga tey somu málini og líka nógv mál. Tey við evnum og áhuga eiga at hava møguleikan at læra enn eitt fremmandamál eftir enskt í fólkaskúlanum. Upplagda valið er týskt, sum vit longu eiga førleikan til. Týskt er eitt sera

hent mál fyri júst føroyingar at læra, tí tað hevur sama málsliga uppruna sum føroyskt og stuðlar tí væl okkara móðurmáli. Samstundis víkir tað so mikið grundleggjandi frá enskum, at tú við báðum málunum ognar tær eina breiðari málsliga fatan.

Í okkara heimsparti er týskt harumframt mest útbreidda móðurmálið eftir russiskt. Og við Brexit kann hugsast, at onnur mál fara at traðka meir fram sum samskiftismál í Evropa í framtíðini.

Her heima er eisini nógv frammi um, at ferðavinnan skal mennast. Stórur partur av ferðafólkunum í Føroyum er týskmæltur, men onnur mál eru eisini væl umboðað. Skal ferðavinnan veruliga gerast eitt eyka bein at standa á, er ilt at ímynda sær eina støðu, har vit í framtíðini fara at innflyta útlendska arbeiðsmegi at tosa málini fyri okkum, sum vit við verandi gongd ikki longur fara at duga.

## Fortreyt fyri góðum málkunnleika

Týskt er harumframt ein góð barlast fyri næmingar, sum ynskja at velja fremmandamál á miðnámi. Royndir vísa, at næmingar ofta ikki hava nóg góðan málsligan førning við sær, um ikki tey eisini hava havt týskt í fólkaskúlanum. Hetta sæst aftur í fráfallinum í fremmandamálslærugreinum á miðnámi, sum er sera óheppið fyri teir næmingar, sum á hálvari leið í skúlagongdini varnast, at tey hava valt skeivt.

Eisini vísa royndir, at næmingar, sum hava neyðuga málsliga førningin við sær, klára seg betur í *øllum* fremmandamálum á miðnámi. Týskt í fólkaskúlanum er sostatt við til at lyfta stigið í fremmandamálunum sum heild á miðnámi, sum eisini er neyðugt, um næmingarnir skulu fóta sær so mikið, at teir megna at brúka eitt byrjanarmál sjálvstøðugt eftir lokið miðnám.

## Framtíðar útlit fyri fremmandamálum

Støðan hjá fremmandamálunum undantikið enskum er so kritisk sum ongantíð áður. Samanumtikið er undirtøkan metlág í týskum og fronskum, tó nakað frægari í sponskum. Øll trý málini hava verið fyri støðugari afturgongd seinastu árini, men nú er botnurin rokkin fyri tvey teirra, og við verandi gongd er spurningurin, um ella hvussu leingi hesi fremmandamálini enn verða at síggja á tímatalvuni.

Hóast stóra afturgongd er ein orsøk eisini, at flestu næmingar nú velja spanskt fram um bæði franskt og týskt. Hví ójavnin er so stórur, er ein áhugaverdur spurningur. Ikki tí, einki mál er í sjálvum sær meira ella minni vert enn eitt annað. Øll eru tey týðandi heimsmál, og tí átti myndin helst at sæð nakað øðrvísi út. Hugsa vit um málførleikan í Føroyum sum heild, átti myndin eisini at sæð nakað øðrvísi út.

At týskt framhaldsmál á miðnámi røkkur einum hægri B og A stigi, enn bæði franskt og spanskt kunnu sum byrjanarmál eina, tykist heldur onga ávirkan at hava á næmingavalini.

## Bygnaðarligar broytingar

Tað gongur greitt fram, at við verandi skúlaskipan eru fremmandamálini hvørki fuglur ella fiskur. Tí er mest átrokandi og grundleggjandi spurningurin av øllum: Skulu vit framhaldandi duga fremmandamál í Føroyum? Omanfyri er víst á, at fremmandamálini hava síni eginvirði - og meir enn tað.

Vilja vit fremmandamál, skulu eisini neyðugu karmarnar til. Sum nú er, eru tað tey 13-16 ára gomlu, sum gera av, hvørji mál føroyingar skulu duga í framtíðini. Tað er hvørki nøktandi fyri næmingar ella landið sum heild. Vit mugu viðurkenna, at neyðugt er at læra enn eitt fremmandamál í fólkaskúlanum eftir enskt, um fremmandamál á miðnámi skulu røkka nøktandi stigi. Alt talar fyri at halda fast í týskt, sum aftur má gerast krav fyri at koma inn á í øllum førum hugbreytina á miðnámi. Harumframt tørvar næmingunum kunning um fremmandamálini og møguliga vegleiðing, tá teir søkja inn á miðnám.

Samstundis, sum týskt aftur má verða upptøkukrav til hugbreyt, átti týskt sum byrjanarmál at verið avtikið á miðnámi, tí tað ger meir skaða enn gagn sum valmøguleiki á pappírinum. Hetta hevur fleiri óhepnar avleiðingar við sær fyri næmingarnar. Harumframt stuðlar týskt byrjanarmál ikki tankanum, at næmingarnir skulu ogna sær neyðuga málsliga førningin, áðrenn teir koma á miðnám. Kanska lærugreinin týskt á miðnámi skuldi fingið eina «gularót» fyri at vera einasta framhaldsmál av teimum trimum fremmandamálunum á miðnámi (umframt enskt).

Ein loysn má finnast fyri lærugreinina danskt, sum ikki hoyrir heima í flokki við fremmandamálum. Danskt tekur í verandi skipan frá fremmandamálunum, hóast tað ikki er eitt fremmandamál hjá okkum. Óneyðugt er at krevja enskt A stig yvirhøvur, tí B stig er nøktandi til flestu framhaldsútbúgvingar og gevur meir enn neyðuga førleikan at fóta sær sjálvstøðugt í enskum.

Útlendingar hava mangan havt á orði, hvussu væl føroyingar duga mál. Lat okkum varðveita hetta føroyska sereyðkennið og leggja okkum eftir at fáa enn meir burtur úr hesum førleika í framtíðini.